Sosialurin





## Heiðrik á Heygum við spennandi stakfløgu

Heiðrik á Heygum gevur fløgu út fyrst í desembur, men nú fáa vit ein forsmakk uppá fløguni, tí í dag kemur stakfløgan "Jealous" við seks remixaðum løgum og talan er uttan iva um fyrstu fløguna av sínum slag her á landi. Teir, sum hava remixað, eru Brynjolfur á Heygum, best kendur frá Side Effect, umframt Janus Rasmussen og Sakaris Joensen, best kendir úr Lama Sea. Jens L.Thomsen og Ólavur Jákupsson, hava eisini givið sítt íkast, men harumframt hevur DJ ,Dan Jones, sum spælir á kendastu diskotekunum í London, gjørt eitt remix. Í hesum sambandi, verður konsert í Mentunarhúsinum í Fuglafirði fríggjakvøldið har Heiðrikkur fer at spæla úr fløguni við einum akkustiskum setti. Brot úr fløguni hoyrast á www.myspace.com/heidrik



*179 sessir eru á Christansborg, her av tveir føroyskir og tveir grønlendskir, ið kunnu gerast avgerandi*

# Miðflokkurin spennandi

**10 prosent av veljarunum hjá Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum hava leitað sær í annan flokk til fólkatingsvalið, og nýggju veljarar Miðfloksins kunnu blíva avgerandi fyri úrslitið. Hetta vísti veljarakanningin, sum Fynd gjørdi fyri Sosialin undan valinum.**

POLITIKKUR

*Jógvan Mørkøre*
*Samfelagsfrøðingur*

Veljarakanningin, ið varð gjørd sunnudagin, gav Tjóðveldinum tryggan sess á fólkatingi og harnæst Fólkaflokkinum næsta umboðið, men í harðari kapping við Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin. Spurningurin er so, hvat ið kann broytast á sjálvum degnum. Svarið tykist vera nýggju veljararnir hjá Miðflokkinum.

### Hvør letur til hvønn?

Tá umræður sonevndu marginalveljararnar, eru hesir í nógvum førum lættir at missa, men samstundis eisini lættir at fáa aftur. Tað kann hugsast, at endaumfarið í valstríðnum hevur flutt okkurt, ella seinasti raksturin mánadagin ella í dag á sjálvum valdegnum.

Hyggja vit fyrst eftir, hvørjir veljarar eru farnir í annan flokk, síðani seinasta fólkatingsval, so eru tað serliga Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin, ið hava bløtt, tí 9-10 prosent hava leitað sær til annan flokk. Tað er kortini ikki so nógv meira enn eitt nú missurin hjá Javnaðarflokkinum, ið hevur latið 7-8 prosent til aðrar flokkar, og hjá Tjóðveldinum, ið hevur latið eini 6-7 prosent. Fólkaflokkurin hevur serliga latið til Sambandsflokkin og Miðflokkin. Javnaðarflokkurin hevur serliga latið til Sambandsflokkin og til Tjóðveldið, meðan Tjóðveldið bløðir til Miðflokkin, helst orsakað av missinum av Karsteni Hansen. Tað, Sambandið má lata, fer út á fleiri flokkar.

### Tey ivingarsomu

Ein bólkur, ið altíð er serliga áhugaverdur, er tey ivingarsomu. Tey, ið siga seg ivast, ikki ætla sær á val, vilja atkvøða blankt og so framvegis. Tað er altíð áhugavert at hyggja nærri eftir, hvør flokkur fær mest frá hesum partinum av veljarahópinum. Halda vit okkum til teir fýra stóru flokkarnar, so eru tølini frá A til E umleið hesi: 20, 16, 19

| | Fólkafl. | Sambandsfl. | Javnaðarfl. | Sjálvstýrisfl. | Tjóðveldi | Miðfl. | Blankt | Ikki á val | Veit ikki / ógreitt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkin | 85,5 | 3,0 | 0,0 | 14,3 | 0,0 | 15,4 | 0,0 | 17,6 | 14,6 |
| Sambandsflokkin | 3,5 | 84,8 | 1,1 | 14,3 | 1,6 | 11,5 | 20,0 | 11,8 | 15,7 |
| Javnaðarflokkin | 1,3 | 3,0 | 88,5 | 0,0 | 2,3 | 3,8 | 20,0 | 8,8 | 19,1 |
| Sjálvstýrisflokkin | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 42,9 | 0,8 | 0,0 | 20,0 | 2,9 | 2,2 |
| Tjóðveldisflokkin | 0,0 | 0,0 | 1,1 | 14,3 | 86,7 | 23,1 | 0,0 | 11,8 | 18,0 |
| Miðflokkin | 1,3 | 1,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 26,9 | 0,0 | 0,0 | 2,2 |
| Blankt | 0,0 | 1,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 5,9 | 0,0 |
| Ikki valrætt | 3,9 | 4,0 | 3,4 | 0,0 | 3,9 | 3,8 | 0,0 | 0,0 | 2,2 |
| Ikki á vali | 2,6 | 1,0 | 4,6 | 7,1 | 3,9 | 15,4 | 20,0 | 35,3 | 18,0 |
| Veit ikki / ógreitt | 1,3 | 2,0 | 1,1 | 7,1 | 0,8 | 0,0 | 20,0 | 5,9 | 7,9 |
| Tils. | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 |

**Hvør fær frá hvørjum? (%)**

| | Fólkafl. | Sambandsfl. | Javnaðarfl. | Sjálvstýrisfl. | Tjóðveldi | Miðfl. | Blankt | Ikki á val | Veit ikki / ógreitt | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkin | 89,9 | 3,2 | 0,0 | 2,2 | 0,0 | 4,3 | 0,0 | 6,5 | 14,0 | 100,0 |
| Sambandsflokkin | 2,6 | 73,7 | 0,9 | 1,8 | 1,8 | 2,6 | 0,9 | 3,5 | 12,3 | 100,0 |
| Javnaðarflokkin | 0,9 | 2,8 | 72,6 | 0,0 | 2,8 | 0,9 | 0,9 | 2,8 | 16,0 | 100,0 |
| Sjálvstýrisflokkin | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 54,5 | 9,1 | 0,0 | 9,1 | 9,1 | 18,2 | 100,0 |
| Tjóðveldisflokkin | 0,0 | 0,0 | 0,7 | 1,4 | 79,3 | 4,3 | 0,0 | 2,9 | 11,4 | 100,0 |
| Miðflokkin | 9,1 | 9,1 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 63,6 | 0,0 | 0,0 | 18,2 | 100,0 |
| Blankt | 0,0 | 33,3 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 66,7 | 0,0 | 100,0 |
| Ikki valrætt | 16,7 | 22,2 | 16,7 | 0,0 | 27,8 | 5,6 | 0,0 | 0,0 | 11,1 | 100,0 |
| Ikki á vali | 4,3 | 2,2 | 8,7 | 2,2 | 10,9 | 8,7 | 2,2 | 26,1 | 34,8 | 100,0 |
| Veit ikki / ógreitt | 6,3 | 12,5 | 6,3 | 6,3 | 6,3 | 0,0 | 6,3 | 12,5 | 43,8 | 100,0 |

**Hvør letur til hvønn? (%)**